# Húgvutátturin

1.
Eg átti mær ein húgvu,
tøvd var hon í tóva,
tíggju konur og tíati
hana úr vatni drógu.

2.
Tíggju konur og tíati
hana úr vatni drógu,
hon hevði einki annað lýti,
uttan rendurnar vóru ov stórar.

3.
Har komu allar vevkonur
hvør við sínum vavi;
har komu allir fjallmenn,
hvør við sínum stavi.

4.
Har komu allir spunamenn,
hvør við sínum rokki;
har komu allar bindingarkonur,
hvør við sínum stokki.

5.
Har komu allir veltingarmenn,
hvør við sínum haka;
har komu allar seymkonur,
hvør við sínum staka.

6.
Har komu allar seymkonur,
hvør við síni nál;
har komu allir drykkjumenn,
hvør við síni skál.

7.
Har komu allir jarnsmiðir,
hvør við sínum jarni;
har komu allar bróstakonur,
hvør við sínum barni.

8.
Har komu allir bátasmiðir,
hvør við síni tong;
har komu allir fleygingarmenn,
hvør við síni stong.

9.
Har komu allir træsmiðir,
hvør við sínum knívi;
har komu allar hoykonur,
hvør við síni rívu.

10.
Har komu allir útróðrarmenn,
hvør við sínum snøri;
har komu allar kirningarkonur,
hvør við sínum smøri.

11.
Har komu allar tíningarkonur,
hvør við sínum trogi,
har komu allir bakkamenn,
hvør við sínum togi.

12.
Har komu allir slóttumenn,
hvør við sínum líggja;
har komu øll tey fólkini
mína húgvu at síggja.

13.
Kongur beyð mær ríkið hálvt,
kúgv á hvørjum ári;
eg læt ikki húgvu mína,
tí tá var eg ein dári.

14.
Kongur beyð mær ríkið hálvt,
tógvar hestar hvítar;
eg vildi ei mína húgvu lata,
mær tókti tað vera ov lítið.

15.
Kongur beyð mær dóttur sína,
tann hin væna moy,
annar beyð mær knørrin tann,
ið sigldi fyri Skánoy.

16.
Farin er nú húgva mín,
mangt er fyri hana prangað,
fingið fyri hana tógvar knívar,
brendir upp í tanga.

17.
Farin er nú húgva mín,
tað má eingin vita,
fingið fyri hana tógvar knívar,
hvørgin bítur bita.

18.
Farin er nú húgva mín,
mangt er fyri hana boðið,
fingið upp í tóma vomb
eina sleiv av soði.